# VIKULIÐIÐ

vodafone deildin VIKA 25

*Ítróttartoymi úttekur Vikuliðið, og eru leikarans avrik mett út frá Vodafone-dystunum í farnu viku.*




Uppstilling: **3-4-3**



# KÍ nýtt oddalið

**1. DEILD MENN** Tað er staðfestingin eftir at fult umfar hevur verið í 1.deild í dag. KÍ og 07 Vestur greiddu sínar uppgávur á útivølli, meðan TB snávaði í Runavík

Tróndur Arge

Oddaliðið av Tvøroyri, TB, var á vitjan í Runavík og tapti 2-0. Tað var ikki fyrr enn seint í seinna hálvleiki, at NSÍ fekk hol á. Tað var ikki fyrr enn at Dan Mortensen var vístur av vølli, at NSÍ kom á odda. Fyrst skoraði Árni Fredriksberg og løtu seinni økti Andrias á Líknagøtu.

KÍ tók av møguleikanum og liggur nú á odda í 1.deild. Teir vunnu greiðan 4-0 sigur á botnliðnum B68. Bárður J. Heinesen skoraði tey, meðan Jógvan Isaksen og Høgni Madsen skoraðu eitt í part.

Hitt liðið í uppflytingarstríðnum, 07 Vestur, vunnu eisini greiðan sigur. Teir vitjaðu Víking, sum stóð ímóti í 37 minuttir, men so skramblaði korthúsið. Jovan Panic skoraði tvey mál uppá tveir minuttir og áðrenn hálvleik økti Jóhan Ejvind Mouritsen. Henning Joensen staðfesti sigurin fimm minuttir fyri tíð.

HB var á vitjan á niðara vølli í Gundadali, har FC Hoyvík hevur heimavøll. FC Hoyvík hevur stórar ætlanir, men í løtuni stríðast teir fyri lívinum í botninum í 1.deild. Fyrstu minuttirnir bendi lítið á, at FC Hoyvík fór at tapa stórt, men eftir fimm minuttir fekk HB brotspark, sum Rani D. Christiansen umsetti til mál. Eftir hálvan tíma skoraði Hanus Thorleifsson dagsins mál, tá hann úr spískum lyfti bóltin uppum málmannin hjá FC Hoyvík og í mál. Í seinna hálvleiki økti Hanus Thorleifsson til 3-0, áðrenn Rani D. Christiansen enn eina ferð skoraði trygt uppá brotsspark til endaliga úrslitið 4-0 til HB.

Fimti dysturin var á Argjum, har eitt styrkt EB/Streyma lið við eitt nú Pæturi Dam Jacobsen og Bjarna Jørgensen á liðnum, vann 3-0 á AB. Stutt fyri hálvleik var tað Pætur Dam Jacobsen, ið legði EB/Streym á odda. Tað gingu bara tíggju minuttir av seinna hálvleiki, so var dysturin avgjørdur. Fyrst økti Arnar Dam til 2-0, áðrenn Teitur Joensen skoraði til endaliga úrslitið 3-0 til EB/Streym.

*trondur@sosialurin.fo*

**FCH - HB** 0-4 (0-2)
0-1: Rani D. Christiansen, 5.
0-2: Hanus Thorleifsson, 32.
0-3: Hanus Thorleifsson, 56.
0-4: Rani D. Christiansen, 59.

**Víking - 07V** 0-4 (0-3)
0-1: Jovan Radinovic- Panic, 37.
0-2: Jovan Radinovic- Panic, 38.
0-3: Johan Ejvind Mouritsen, 45.
0-4: Henning S. Joensen, 85.

**AB - EB/Str.** 0-3 (0-1)
0-1: Pætur Dam Jacobsen, 43.
0-2: Arnar Dam, 52.
0-3: Teitur Joensen, 55.

**B68 - KÍ** 0-4 (0-2)
0-1: Bárður J. Heinesen, 36.
0-2: Jógvan Isaksen, 41.
0-3: Bárður J. Heinesen, 59.
0-4: Høgni Madsen, 71.

**NSÍ - TB** 2-0 (0-0)
1-0: Árni Frederiksberg, 74.
2-0: Andrias á Líknargøtu, 78

## Føroyska **1. Deild** *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 18 | 11 | 4 | 3 | 47 | 16 | +31 | 37 |
| 2 | 07 Vestur | 18 | 10 | 6 | 2 | 43 | 19 | +24 | 36 |
| 3 | TB | 19 | 11 | 2 | 6 | 41 | 23 | +18 | 35 |
| 4 | HB II | 19 | 9 | 3 | 7 | 38 | 41 | -3 | 30 |
| 5 | EB/Streymur II | 18 | 8 | 5 | 5 | 38 | 25 | +13 | 29 |
| 6 | Víkingur II | 18 | 7 | 4 | 7 | 28 | 34 | -6 | 25 |
| 7 | NSÍ II | 18 | 5 | 7 | 6 | 27 | 36 | -9 | 22 |
| 8 | AB II | 18 | 6 | 2 | 10 | 24 | 42 | -18 | 20 |
| 9 | FC Hoyvík | 18 | 4 | 5 | 9 | 22 | 35 | -13 | 17 |
| 10 | B68 II | 18 | 0 | 2 | 16 | 10 | 47 | -37 | 2 |